# Eigaraskifti hjá P/F Beta í Saltangará



*Alt virksemið, sum Beta og dóttirfelagið, Kongshavn, hevur havt á sjónum og á bryggjuni í Saltangará er nú selt Faroe Seafood*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Faroe Seafood hevur nú keypt alt virksemið hjá P/F Beta og soleiðis eisini landingarmiðstøðini hjá felagnum, Kongshavn**

EIGARASKIFTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í nógv ár hevur Olaf Olsen verið ímyndin av felagnum, P/F Beta, í Saltangará.

Tá Olaf legði frá sær sum reiðari fyri góðum tveimum árum síðan, tók sonur hansara, Ragnar Olsen, við sum stjóri og reiðari – við ábyrgd av skiparakstrinum.

Olaf helt tó í fyrstu syfti fram sum stjóri í felagnum, Kongshavn, sum átti og rak Landingarmiðstøðina í Saltangará.

Kongshavn var dóttirfelag, sum P/F Beta átti allan partapeningin í. Seinasta árið hevur Ragnar Olsen so eisini verið stjóri á Landingarmiðstøðini.

Tað er Ognarfelagið frá 1980, sum átti 95% av partapeninginum í Beta, og Íløgufelagið Tjaldur átti meginpartin av partapeninginum í Ognarfelagnum.

Líggjas í Bø hevur verið nevndarformaður bæði í P/F Beta og Íløgufelagnum Tjaldur.

Íløgufelagið Tjaldur er ogn hjá umleið 2400 partaeigarum og tann, sum varðar av høvuðspartinum, er Hans Andrias Dam.

Líggjas í Bø segði við Útvarpið í gjár, at eigararnir gjørdu av at selja, tí teir fingu eitt gott tilboð frá Faroe Seafood, men hann vildi ikki upplýsa søluprísin fyri virksemið hjá felagnum.

### Áhugamálini

Sum skilst, er tað Hans Andrias Dam, sum gjøgnum Ognarfelagið frá 1980 hevur havt størstu persónligu áhugamálini í virkseminum hjá Beta og dóttirfelagnum, Kongshavn.

Tað var í 1980, at Skipafelag Føroya varð býtt sundur í tvey, soleiðis at farmurin varð verandi í Skipafelagnum, meðan sjálvur fiskivinnuparturin – táverandi Handils-og Fyrstivirkið í Fuglafirði og Beta – fóru í Ognarfelagið frá 1980.

Tá ið hetta varð gjørt, vóru eigaraviðurskiftini í Skipafelagnum og Ognarfelagnum identisk.

Tað var Oddur Niclasen, sáli, sonur Sakarias Niclasen, nevndur Sakarias á Skipafelagnum, sum saman við Árna Joensen var høvuðspersónurin í Skipafelag Føroya, tá ið felagið varð býtt í tvey.

Síðan hevur Hans Andrias Dam, sum er systursonur Odd Niclasen, varað av einum stórum parti av partapeninginum.

Tað er ikki langt síðan, at Eimskip keypti Skipafelag Føroyar, og nú hevur so Faroe Seafood keypt alt virksemið hjá P/F Beta og soleiðis eisini landingarmiðstøðini hjá felagnum, Kongshavn.

## Minni enn 5% í Beta


*Olaf Olsen, fyrrverandi reiðari*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

EIGARASKIFTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað munnu vera mong, sum hava hildið, at Olaf Olsen, sum var ímyndin av P/F Beta í mong ár, átti ein stóran part av hesum felag.

Men so er ikki.

Hvørki Olaf Olsen ella sonurin, Ragnar Olsen, ið tók við sum reiðari eftir faðirin, hava átt partapening í P/F Beta.

Men fyri nøkrum mánaðum síðan gjørdist Olaf Olsen ein av partaeigarunum í hesum felag, sum eisini hevur átt og rikið landingarmiðstøðina í Saltangará.

Nú alt virksemið felagsins varð selt, átti Olaf Olsen minni enn 5% í P/F Beta, men hann er ein av partaeigarunum í P/F Tjaldur.

Við søluni av P/F Beta er parturin hjá Olafi Olsen so eisini seldur.

# Ragnar Olsen á veg til Spaniu

**– Sjálvandi skulu áhugamálini hjá eigarunum – bæði teimum, sum nú hava selt og nýggju eigarunum, røkjast, og tí eri eg nú á veg niður til Spaniu, sigur Ragnar Olsen**

EIGARASKIFTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nú sáttmáli er undirskrivaður millum Ognarfelagið frá 1980 og Faroe Seafood um sølu/ keyp av øllum virkseminum hjá felagnum, Beta, er ógreitt, um Ragnar Olsen, sum hevur verið reiðari og stjóri í felagnum seinastu árini, fer at halda fram hjá nýggju eigarunum.

– Sjálvandi havi eg í eina tíð vitað, hvat hevur verið í umbúna. Tað vil so vera, tá ið tú ert dagligur leiðari í fyritøkuni. Um eg eri keddur ella ikki, dugi eg ikki at siga í løtuni.


*– Sjálvandi havi eg í eina tíð vitað, hvat hevur verið í umbúna. Tað vil so vera, tá ið tú ert dagligur leiðari í fyritøkuni. Um eg eri keddur ella ikki, dugi eg ikki at siga í løtuni, sigur Ragnar Olsen*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Spurdur, um hann væntar at halda fram í starvi hjá nýggju eigarunum, sigur Ragnar, at tað dugir hann ikki at siga í løtuni.

– Sum eg havi skilt, verður yvirtøkudagurin av virkseminum mánadagin komandi, og eg dugi ikki í løtuni at siga, hvussu verður.

Hann sigur seg ikki vita við vissu, hvussu Faroe Seafood ætlar at reka virksemið víðari.

Ragnar sigur, at hann hevur góða tíð, og sum dagarnir ganga, verður greitt, hvussu verður og ikki.

– Hvør mín leiklutur verður frameftir, fer tíðina at vísa. Livst, so spyrst, leggur hann aftrat.

Tá ið Sosialurin hitti Ragnar Olsen í telefonini í morgun, var hann á veg til Spaniu, har felagið letur tveir nýggjar trolarar byggja.

– Sjálvandi skulu áhugamálini hjá eigarunum – bæði teimum, sum nú hava selt og nýggju eigarunum, røkjast, og tí eri eg nú á veg niður til Spaniu, sigur Ragnar.

Hann væntar ikki, at nýggju skipini verða liðug síðst í hesum árinum, sum ætlanin annars var, men hann væntar, at tey í staðin verða liðug og klár til fiskiskap til várs.

Ragnar Olsen sigur, at umframt nýggju skipini, sum nú verða bygd í Vigo í Spaniu, átti felagið tvey loyvi aftrat.

– Málið hjá okkum var at byggja tilsamans seks nýggj skip fyri teir átta gomlu kuba-trolararnar, sigur reiðarin í Saltangará.